Føroya Arbei›ara-felag 75 ár

Mánadagurin ver›ur ein merkisdagur ein stórur í føroyskari fakfelagssøgu. Tí hendan dagin fyllir landsins størsta fakfelag, Føroya Arbei›arafelag 75 ár.

Ta› var fyrst í hesi øldini, at arbei›sfólk kring landi› fóru at taka seg saman í fakfeløg. Fyrsta veruliga fakfelagi› var› stovna›, tá i› Enigheden á Tvøroyri, var› sett á stovn. Enigheden hevur seinni fingi› navni› Arbei›smannafelagi› Fylking.

Sí›ani blivu feløg eisini stovna› í Havn í 1916, í Vági í 1920, í Klaksvík í 1923 og a›rasta›ni vi›.

Men ta› var ikki nógv samband ímillum feløgini tá á døgum Tó var eitt ávíst samstarv ímillum tey bæ›i elstu feløgini, Enigheden á Tvøroyri og Havnar Arbei›smannafelag. Men skipa› samstarv var onki.

Men í 1925 vór›u stig tikin til at savna øll arbei›arafeløgini í ein landsfelagsskap og kalla› var› til fundar í hølunum hjá Havnar Arbei›smannafelag tann 17. desember í 1925.

Hesin fundurin var› drúgvur og um kvøldi› var› hann ni›urlagdur. Men dagin eftir, 18. desember, var› hann tikin uppaftur, og tá var› Føroya Arbei›arafelag formliga stovna›. Samstundis vór›u lógir samtyktar og nevnd vald.

Tey, sum vóru vi› til at stovna› felagi›, vóru Havnar Arbei›smannafelag, Klaksvíkar Arbei›smannafelag, Enigheden á Tvøroyri, Framtí›in í Vági og Føroya Fiskimannafelag.

Fyrsti forma›ur í Føroya Arbei›arafelag var Maurentius Vi›stein.

Sí›ani tá hevur felagi› havt eina skiftandi lagnu. Eitt nú eru Fiskimannafelagi› og feløgini í Klaksvík og í Havn farin burturúr. Men sí›ani eru nógv onnur feløg komin uppí, so at Føroya Arbei›arafelag nú fevnir um øll arbei›arafeløgini í landinum, uttan feløgini í Havn og í Klaksvík.

Í 1964 hendi ein kollvelting í virkseminum hjá felagnum, tí i› keypti FA hús vi› Tjarnadeild. Og seinni, í 1981, var› alt Vallaraheimi›, sum lá á sama stykki í Tjarnadeild, keypt, so har hevur Føroya Arbei›arafelag nú bæ›i umsiting og fundarhøli.

Sí›ani hevur Føroya Arbei›arafelag ment seg til eitt sterkt og vælskipa› felag, sum umframt at røkja sáttmálasettu rættindini hjá limunum, eisini hevur sett á stovn bæ›i verkfallsgrunn og harafturat eisini ymsar sosialar skipanir fyri limirnar. Eitt nú hevur felagi› bæ›i sjúkragrunn og lívstrygging og ta› hev›i eisini í nøkur ár ver›i› arbeitt vi› at seta eftirlønarskipan í verk í nøkur ár. Men, nú Landsst‡ri› barsla›i vi› sínari eftirlønarætlan, er ta› óvist, hvussu ver›ur vi› ø›rum ætlanum.

Ingeborg Vinther, forma›ur í Føroya Arbei›arafelag, er sjálv fjór›a á skrivstovuni hjá felagnum.

Í sambandi vi› hátí›ardagin, fara vit í bla›num í dag og í morgin, at hava samrø›ur vi› Ingeborg Vinther, sum nú hevur veri› forma›ur í Føroya Arbei›arafelag í 20 ár. Vit tosa vi› hana um tí›ina í Føroya Arbei›arafelag, eitt sindur um framtí›ina og um ymisk mál, sum eru uppi í tí›ina. Samrø›urnar ver›a prenta›ar í bla›num í dag og í morgin

Føroya Arbei›arafelag var› stovna› í hølunum hjá Havnar Arbei›smannafelag tann 18. desember í 1925. Sí›ani hevur felagi› ment seg til at gerast eitt stórt, sterkt og vælskipa› felag. Ingeborg Vinther hevurnú veri› forvkinna í heili 20 ár

Væntar har›ar samrá›ingar

–Tá i› samrá›ingar ver›a aftur í vár, fara vit at krevja lønarhækking og at arbei›sgevarar betala í n‡ggja eftirlønargrunnin, sum landsst‡ri› ætlar at seta í verk. Ta› slepst ikki undan, at teir eisini skulu betala í grunnin, sigur Ingeborg Vinther

Mynd J. Kr.Vang

– Ingeborg Vinther væntar, at tær næstu lønarsamrá›ingarnar, sum ver›a longu í vár ver›a har›ar og truplar. Eitt krav ver›ur, at arbei›sgevararnir skulu betala til ta› n‡ggju eftirlønarskipanina, sigur Ingeborg Vinther

SÁTTMÁLA-SAMRÁ‹INGAR
Áki Bertholdsen

Ta› er nógv, sum bendir á, at tær næstu sáttmálasamrá›ingarnar ímillum Føroya Arbei›arafelag og Føroya Arbei›sgevarafelag ver›a bæ›i har›ar og truplar.

Ta› heldur Ingeborg Vinther, forkvinna í landsins størsta fakfelag, Føroya Arbei›arafelag.

Men ta› gevur hon landsst‡rinum skyldina fyri.

Hon heldur, at størsti meinbogin fyri samrá›ingunum, sum ver›a longu í vár, er, at landsst‡ri› hevur kunngjørt, at ætlanin er at seta eina eftirlønarskipan í verk, har løntakarin skal gjalda ein ávísan prosentpart av lønini í ein eftirlønagrunn, men at arbei›sgevarin sleppur undan at betala í grunnin.

Men Ingeborg Vinther sigur, at ta› er ney›ugt, at arbei›sgevarar eru vi› til at betala í eftirlønargrunnin.

– Lønin er lág frammanundan. Og hesi seinastu árini er keypiorkan máa› undan lønini vi› príshækkingum, ikki minst á olju, men eisini vanligar húsarhaldsvørur eru nógv d‡rka›ar. Sostatt er keypiorkan hjá vanliga fólkinum munandi versna› hesi bæ›i sí›stu árini.

– Tí ber ta› als ikki til, at arbei›sfólk eisini skulu betala upp í fleiri prosent av lønini í eina eftirlønarskipan afturat og tí slepst heldur ikki undan, at arbei›sgevararnir eisini betala í grunnin.

Krøv til samrá›ingarnar

Ingeborg Vinther sigur, at hon heldur, at ta› er sjálvsagt, at landsst‡ri› vi› lóg eisini áleg›i arbei›sgevarunum at gjalda til ta› n‡ggju eftirlønarskipanina.

– Men tá i› ta› ikki ber til, av tí at landsst‡ri› vi› sleppa teimum undan, so er onki at gera, uttan at fáa vi›urskiftini í rættlag vi› samrá›ingunum.

Ingeborg Vinther er fullgrei› yvir, at skal Føroya Arbei›arafelag at togast vi› arbei›sgevararnar um at gjalda til eftirlønarskipanina í samrá›ingunum í vár, ver›ur ta› ómetaliga strævi› eisini at fáa eina lønarhækking.

– Men ta› er ongin sum helst ivi um, at Føroya Arbei›arafelag fer eisini at krevja lønarhækkingar fyri at byrgja upp fyri teimum útrei›sluhækkingum, sum tey vanligu húskini hava veri› fyri hesi bæ›i seinastu árini, sigur Ingeborg Vinther.

Tí væntar hon, at avger›in hjá landsst‡rinum at sleppa arbei›sgevarunum undan at betala í eftirlønargrunnin, fer at koma aftur um brekkur, tí ta› fer at ávirka samrá›ingarnar í vár nógv og kann enda vi› at skapa stóra órógv á arbei›smarkna›inum.

Ingeborg Vinther sigur, at í Føroya Arbei›arafelag hava tey tosa› eitt sindur um, hvørji krøv skulu setast til sáttmálasamrá›ingarnar í vár.

– Men ta› er ikki komi› so langt enn, at naka› er avgjørt. Ta› er tó heilt greitt, at krav ver›ur bæ›i um, at arbei›sgevarar skulu betala í eftirlønargrunnin og at vit fáa lønarhækking omaná. Ta› ber ikki til at fara frá aftur samrá›ingarbor›inum, uttan at hava fingi› eina lønarhækking, sigur Ingeborg Vinther avgjørd.

Nú hevur landsst‡ri› gjørt av at geva skattalætta. Fer ta› ikki at ávirka samrá›ingarnar hinvegin, so at krøvini ikki fara at vera so hør›, sum tey annars høvru veri›?

– Nei, ta› ger ta› ikki. Skattalætti og lønarsamrá›ingar eru hvør sítt mál. Annars er skattalættin so vælsigna› lítil, at hann ger púra ongan mun. Tí fer hann heldur ikki at fáa nakra sum helst ávirkan á krøvini til arbei›sgevararnar í teimum komandu samrá›ingunum.

Ingeborg Vinther sigur, at landsst‡ri› reypar í heilum av øllum yvirskotinum á fíggjarlógini og at landskassin stendur á tremur.

– Vildi landsst‡ri› linka› tr‡stí› á tey lágløntu, skuldi ta› eitt nú, lækka oljuavgjaldi›. Men ta› beint øvugta er hent -ta› er hækka›. Somulei›is kundi Landsstyri› lækka mvg og givi› ein veruligan skattalætta.

– Tá kundu vit byrja at tosa um at linka krøvini til tær komandu samrá›ingarnar, sigur forma›urin í Føroya Arbei›arafelag.

Fakfeløgini mugu taka virknari lut í politikki

– Nú er tí›in komin hartil, at fakfeløgini beinlei›is eiga at stu›la teimum flokkum, sum taka undir vi› fakfeløgunum

FAKFELØG OG POLITIKKUR
Áki Bertholdsen

– Taka vit ikki anna› skinn um bak, koma vit skjótt at standa eftir sum teir stóru tapararnar.

Ta› heldur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbei›arafelag.

Hon heldur, at ágangurin á fakfeløgini frá teimum politisku flokkunum er so stórur, at ta› ver›ur ney›ugt hjá feløgunum, at tey fara at hugsa meiri politiskt.

Og tá i› hon sigur politiskt, meinar hon partapolitiskt.

– Fakfeløgini hava sjálvandi altí› blanda› seg meiri og minni upp í politikk. Ta› allarmesta, sum hevur vi› fakfelagsarbei›i› at gera, er onkusvegna politikkur og tí er ta› sjálvsagt, at feløgini blanda seg uppí politikk í síni heild.

– At siga, at fakfeløgini ikki skulu leggja seg út í politikk, ber slett ikki til, tí alt lívi› er politikkur.

– Men higartil hava fakfeløgini í Føroyum ikki blanda seg uppí partapolitikk.

Í ø›rum londum er ta› ikki óvanligt, at fakfeløg leggja seg beinlei›is út í partapolitikk og stu›la ávísum flokkum beinlei›is, bæ›i vi› at heita á limirnar um at atkvø›a fyri ávísum flokkum og vi› at hjálpa ávísum flokkum vi› fíggjarligari hjálp til valstrí›ini. Og Ingeborg Vinther er sannførd um, at ta› er hendan lei›in, sum tey føroysku fakfeløgini eisini noy›ast at ganga. Men hon leggur tó dent á, at ta› kann kortini ikki koma upp á tal at stu›la flokkum fíggjarliga

Hon sigur, at ta› er fer› eftir fer›, at ta› kemur fyri, at lógir ver›a smoygdar ni›uryvir fakfølgini, sum tey ikki vilja vita av.

Hon sigur, at eftirlønarlógin og ætla›a lógin um seming eru tvey spillfesk dømi um hetta.

Í eftirlønarlógini ver›ur arbei›sgevarin sleptur undan allari ábyrgd. Samstundis ver›ur stættarmunurin sta›festur heilt í grøvina, tí tann, sum hevur eina høga lívsløn, skal eisini fáa eina høga eftirløn.

Ingeborg saman vi› Elias Hansen av Skála, vm. og Marius Clementsen av Sandi, hm., sum bá›ir eru í stjórnini í FA

Mynd: J.Kr. Vang

– Og í lógini um seming er ta› ætlanin at taka verkfalsrættin frá fakfeløgunum vi› at geva semingsmanninum óavmarka›an rætt til at útseta verkfall. Samstundis er ætlanin at gera ta› at kalla ógjørligt at fella semingsuppskot.

Men Ingeborg Vinther ivast ikki í, at enn fleiri uppskot fara at koma, sum fara at skerja møguleikarnar hjá fakfeløgunum at virka.

– Í løtuni eru vit á eini fullkomiliga skeivari kós. Vit síggja ta› á lógarsmí›inum, sum fer› eftir fer› ger seg inn á fakfeløgini. Og vit síggja ta› í samrá›ingunum, ikki minst á almenna arbei›smarkna›inum, har i› Fíggjarmálast‡ri› vísir slíka vanvir›ing ímóti fakfeløgunum, sum sjálvdan sæ› á›ur.

Tí heldur hon, at tí›in nú er komin hartil, at fakfeløgini eiga at taka ein nógv meiri virknan lut í politikki.

Ingeborg Vinther heldur kortini ikki, at fakfeløgini skulu fara at stu›la einstøkum politiskum flokkum fíggjarliga.

– Men eg haldi, at vit eiga gera okkum greitt, at ta› er ney›ugt hjá okkum at taka meiri virknan leiklut í politikki. Ta› kunnu vit gera vi› at stu›la teimum flokkum, sum stu›la okkara sjónarmi›jum á Løgtingi.

– Hetta skal gerast vi› at fakfeløgini mæla fólki til at atkvø›a fyri teimum flokkum, sum stu›la fakfelagspolitikki á Løgtingi.

Hon sigur, at hetta er vanligt í Grønlandi og hevur eisini veri› gjørt í Íslandi vi›hvørt. Og ta› heldur hon, at fakfeløgini í Føroyum eisini eru noydd til at gera nú.

– Kunnu flokkarnir ikki taka í her›atoppin á politikarum, sum fara so langt av lei›, sum ávísir politikarar í hesi samgongurin eru farnir, sum eiga fakfeløgini at bera so í bandi, at flokkurin sví›ur fyri ta›, og missur atkvø›ur, tá i› val ver›ur aftur, sigur Ingeborg Vinther.

Áttatiárini mugu fáa avlei›ingar

– Eg haldi, at ta› er ov lætt sloppi›, tá i› politikararnir siga, at nú jar›a vit bara líki› og so gloyma vit alt, heldur forma›urin í Føroya størsta fakfelag.

ÁTTATIÁRINI
Áki Bertholdsen

– Ta› er eingin ivi um, at frágrei›ingin, sum nú er gjørd um áttatiárini, eigur at fáa avlei›ingar.

Ta› heldur Ingeborg Vinther, forkvinna í landsins størsta fakfelag, Føroya Arbei›arafelag.

Hon sigur, at ta›, sum fór fram í áttatiárunum, fekk so víttfevndar og álvarsligar avlei›ingar, at ta› er ney›ugt fyri rættarkensluna hjá fólki, at ta› fær avlei›ingar fyri tey, sum høvdu skyldina av gongdini.

Ingeborg Vinther heldur tískil líti› um ta› vi›ger›, sum máli› nú hevur fingi› í Føroya Løgtingi.

Har var fyrr í vikuni eitt deydligt or›askifti, har størsti denturin hevur veri› lagdur á at ansa eftir, ikki at tra›ka nakran á tærnar.

– Hatta haldi eg er ov lætt sloppi›. Eg haldi, at teir skulu ikki sleppa vi› at siga, at nú jar›a vit bara líki› og so lata vit sum onki.

Ingeborg Vinther sigur, at ta› var vanliga fólki›, sum bløddi næstan til avlívis, tá i› alt samfelagi› skrambla›i saman eftir skilaleysar íløgur, skilaleys almenn ve›hald og skilaleysan vinnulívspolikk í áttatiárunum.

Hon sigur, at vanligi føroyingurin, átti hvørki lodd ella deil í tí, sum hendi í áttariárunum.

– Men ta› var vanligi føroyingurin, arbei›arin og handverkarin vi› tímalønini, og øll onnur, sum fingu alla rokningina og mátti galda milliardupphædd fyri at bjarga skútini aftur. Og nógvasta›ni er rokningin ikki goldin enn, tí enn eru ta› fleiri kommunur, sum hava heili 23% í skatti.

– Men teir, sum hava ábyrgdina, teir vaska sínar hendur og siga, at nú hava vit gjørt eina kanning og vit hava fingi› sta›fest, hvat hendi - og so lata vit ta› fara.

Ingeborg Vinther sigur, at árini frá 1992 til 1994 misti Føroya Arbei›arafelag heilar 2.200 limir.

— Nógv av hesum gjørdust fíggjarlig flóttafólk í ø›rum londum og hjá nógvum var ney›in so stór, at tey áttu ikki fyri mat í munnin, ella fyri olju í tangan.

Hon sigur, at hesa tí›ina var veruligt fátækradømi í Føroyum.

Forkvinnan í Føroyar Arbei›arafelag sigur, at hetta er svárasta tí›in, hon hevur havt í fakfelagspolitikki.

– Um ta› var nakar, sum sá ney›ina, so var ta› Føroya Arbei›arafelag. Men var ta› nakar, sum onki fekk gjørt vi› hana, so vóru ta› eisini vit.

Alla skyldina sjálvi

Ingeborg Vinther sigur, at ta› var ongin annar enn føroyingar sjálvir, sum høvdu skyldina av, at samfelagi› fór av knóranum.

– Ta› vóru ein stórur partur av vinnulívsfólkunum, bankarnir og politikararnir, sum forkomu samfelagnum. Sjálvandi kunnu teir ikki standa til svars fyri fiskaloysinum. Men ta› skerst ikki burtur, at ta› vóru tær skilaleysu avger›irnar á landi, íløgurnar, vinnulívspolitikkurin og almennu ve›haldini, sum forkomu samfelagnum.

– Og hvat hugsa nú tey, sum máttu betala rokningina vi› arbei›sloysi, heimloysi, eykaskatti omaná eykaskatti mvg og ø›rum avgjøldum, nú alt skal bara sópast undir teppi›?

– Nógv av hesum somu fólkum, sum elvur til kreppuna, sita enn á ovastu rók í føroyska samfelagnum og ta› er drepandi fyri rættarkensluna hjá fólki.

Ingeborg Vinther dugir annars ikki at siga, hvørjar avlei›ingarnar skuldi veri›.

– Men eg haldi, at málini skuldi ver›i› kanna› gjølligari. M.a. málini um eginpeningin, sum vinnulívsfólk søgdu, at tey høvdu, men sum tey ikki høvdu. Og bankalei›slurnar, sum vátta›u hendan eginpeningin og politkararnir, sum ikki kanna›u máli›.

– Møguliga átti fútin at fingi› málini. Men í øllum førum áttu teir, sum høvdu skyldina av hesum víst teimum, sum máttu blø›a fyri skilaloysi, so frægt av vir›ing, at teir løgdu frá sær, sigur Ingeborg Vinther.

Hava opi› hús mándagin

Nú Føroya Arbei›arafelag fyllir 75 ár mánadagin, er ætlanin at hava opi› hús, har ta› ber til hjá limum, grannum, vi›skiftafólk og fólki annars, at støkka inn á gólvi ›

FØ‹INGAR-DAGUR
Áki Bertholdsen

Nú Føroya Arbei›arafelag fyllir 75 ár mánadagin, er ikki ætlanin, at dagurin skal fara afturvi› bor›inum uttan ví›ari.

Sjálvan fø›ingardagin er ætlanin at hava opi› hús mestsum allan dagin. Ingeborg Vinther sigur, at ætlanin er at hava opi› hús í felagshúsinum í Tjarnadeild 5 í Havn, frá klokkan tr‡ seinnapartin mánadagin, til klokkan 8.30 um kvøldi›.

Har ver›ur okkurt smávegis ábit undir tonnina og eitt glas at fáa. Og Ingeborg Vinther sigur, at har eru fólk vælkomin at støkka inn á gólvi›, ikki minst limir í felagnum, men sanniliga eisini fólk, sum Føroya Arbei›sfelag samskiftir vi›, eins og grannar og fólk annars.

Forkvinnan sigur, at ætlanin er at hava opi› til út á kvøldi›, fyri at eisini limir skulu hava møguleikan at koma inn á gólvi› aftaná arbei›stí›.

Men ta› er eisini ætlanin at gera næsta a›alfundin til naka› serligt. Hann ver›ur í mars mána›a og har møta umbo› fyri tey ymsu lokalfeløgini í Føroya Arbei›arafelag og tá ver›ur gjørt eitt sindur meiri burturúr enn vanligt hevur veri› á a›alfundum.